minnist, at hann tók hendurnar um eina av hesum jarnstúttunum. Hann bleiv hangandi, men hann fleyt í sjónum og var slongdur aftur og fram.

Afturi á dekkinum var sama skil, og tríggir menn duttu niður á fordekkið. Tann eini var av Hellunum ella Oyndarfirði, hann breyt mjødnuna. Axel hoyrdi, at hann rópti Petur Hans úr Lopra um koma at hjálpa sær og at bera seg burtur.

## Bert partur av skipinum undan

Tað sá út, sum um tað bara var tað, sum var frammanfyri brúnna, sum var undan á skipinum. Skipið mestsum stóð í sjónum. Sjógvurin tyktist at trekkja skipið til sín. Tey siga at maskinan sló bakk, og tað kom snúur í róðurstammuna, men hon brotnaði tíbetur ikki.

Tá ið tað fjaraði av aftur og Axel hugdi rundan um seg, sá hann eina rúgvu av tunnum. Teir høvdu tømt livratunnur í havið fyri at kyrra sjógvin.

Aftast á skipinum var eitt høli, sum teir brúktu sum sjúkakamar. Har lógu tveir menn. Teir vóru Dánjal Klein, sum beint aftaná gjørdist formaður í fiskimannafelagnum og ein miðvingur. Teir lógu báðir sjúkir og hava ikki havt tað ov gott.

Telegrafisturin hevði eitt hús, sum stóð uppi á maskinruffinum. Tað fór fyri borð í heilum líki av hesum brotinum. Telegrafisturin lá niðri á dekkinum, tá ið avtornaði, og bjargaðist tískil.

## Róðrið blivið fast

Tá ið teir fingu hendan sjógvin, tá kom róp av brúnni, at róðrið var blivið fast. Skipið kom tí at verða liggjandi tvøran. Tað stóðu fýra ella fimm bátar tvørtur fyri á trý lúkuni aftanfyri maskinrúmið. Tað sást einki aftur til teir. Men tað kundi verið verri enn so. Lúkurnar vóru øgiligar stórar. Hetta var jú ein gamal bátur. Eftir lúkuni lógu tveir sverir stokkar, har endarnir vóru boltaðir niður í dekkið fyri at halda lúkunum. Tann stóri feilur var gjørdur, hóast tað vóru nógvir góðir sjómenn umborð, at teir loystu boltarnar úr endunum á hesum stokkum, so teir kundu flytast eitt sindur út í borðið. So blivu bátarnir settir og surraðir niður. Teir hildu, at nú hildu surringarnar, so stokkarnir ongan veg skuldu fara.

Men surringarnar slitnaðu og stokkarnir fylgdu við. Nú er einki, sum heldur presendingunum á lúkunum uttan skálkijørnini. Hetta var nú so grúiliga óhugnaligt. Tann fremsta lúkan stóð uppá glopp, so luft kundi koma niður til fólkið.

So har kom eini øgiligur sjógvur niður til teir, har fleyt alt, eisini seingjarklæðir. Nú fór ljósið eisini, so her hevur ikki verið stuttligt.

Her hevur verið nógv verri enn á dekkinum. Tað var eisini panikkur hjá nógvum. Men kortini komu ella sluppu menninir ikki upp. Tað hevði nú heldur ikki hjálpt uppá støðuna. Tá kundi eisini verðið eitt rættiligt mannfall.

Tað bøtti ikki um støðuna niðri undir, at bæði bensin og lýsi lak niður á millumdekkið.

Axel sá ein mann á dekkinum, sum var frá sær sjálvum. Men hann sissaðist aftur, og Axel bað hann koma at hjálpa sær.

Tá ið teir frættu, hvussu vorðið var niðri undir, og hvussu tað var við lúkuni, negldu teir so sekstumma seym upp í lúkuna og surraðu niður aftur í karmin. Maskinmeistarin gjørdi alt, hann kundi fyri at hugsa um manningina. Teir bóru dýnurnar niður á ketiltoppin at turka.

Meistarin var ein eldri maður, og Axel minnist, at hann segði, at teir kundu vera glaðir um, at teir høvdu fiskað so lítið. Tí tað var rættuliga vist, at var hann fult lastaður, so kom skipið ikki upp aftur. Tað hevði ikki hent seg.

Meðan skipið lá við síðuni til, fóru teir at koyra rovini av bátunum á nr. tvey lúkuni fyri borð. Har lógu einir tríggir bátar frammanfyri brúnni. Teir vóru farnir frá borðini og kjalarborðini lógu eftir, og motorarnir stóðu í teimum.

Bátarnir lógu og furaðu eftir presendingunum. Teir fingu ordrar til at fáa alt fyri borð. Hetta var spell, tí onkur av bátunum hevði spildurnýggja maskinu. Tað komu eisini fleiri mans upp úr lastini at hjálpa til.

Ein bátur varð standandi eftir har frammi í drukniholinum, teir kallaðu. Tað er tann fyrsta lúkan. Ein bátur var úr Øravík. Skuturin á honum var kvettur av. Skiparin var spurdur, um hesin bátur eisini skuldi fyri borð. "Nei, latið hann standa eftir, so vit hava okkurt at vísa," var svarið.

## Fýrarnir nærum kódnaðir

Tað kom eisini so nógvur sjógvur niður gjøgnum skorsteinin, at tað var líka við, at fýrarnir slóknaðu. Í maskinrúminum stóðu teir uppundir knøini av sjógvi. Hann bleiv so liggjandi tvørur, men tað kom ikki dropi inn á hann, meðan hann lá tvørur. Brotini vóru so stór uppi í lu, men tey komu ikki á teir.

Axel greiðir frá: "Vit gingu har og vistu einki. Men so møtti eg einum kvívíkingi, sum æt Zacharias Müller. Hann hevði verið skipari og var ógvuliga raskur maður. Vit møttust aftan fyri maskinrúmið, og vit søgdu líka sum báðir í senn við hvønn annan: "Latið okkum fara at vita, um vit síggja nakað". Vit fóru at hyggja at róðrinum og sóu beinanvegin, at úti í borðinum, har sum ketan gekk inn til stýrimaskinuna, var ein jarnstong komin inn í blokkaskivuna. Ein uppstandari av gelendaranum, sum var uppi á maskinrúminum, hevði skrætt seg leysan. Hann kann ikki vera farin bert av einum sjógvi. Onkur lutur má hava rent seg á hann. Gelendarin við einum av sínum knøttum er so komin í blokkaskivuna.



*Her liggja menninir í lastini, og tað var ikki gamansleikur*



*Útróðrarmenninir eru komnir uppá dekkið, tá hann makaði veðrið*

## Bert sleggjan lá eftir

Vit vistu, at amboðsskápið var har beint aftanfyri maskinrúmið. Tað var ein sver jarnhurð, sum var fyri. So var eisini ein høg jarngátt, sum ofta er umborð á skipi. Eg minnist, at fyrsti stýrimaður stóð upp við har. Eg talaði á stýrimannin og spurdi, um hann mundi vita, hvar ein sleggja mundi vera. Eg visti tilvildarliga um hetta amboðsskápið frá túrinum yvir til Grønlands. Hann stóð bara har sum ein stútta, hann svaraði ikki. Eg sá, at hann var sjokeraður.

Tað vísti seg, at jarnhurðin var burtur. Alt var sleikt. Amboð var einki eftir, og alt var burtur uttan sjálv sleggjan! Hon var ikki farin um gáttina. So fóru vit við sleggjuni at royna at dríva hendan uppstandaran úr aftur blokkaskivuni. Tað lukkaðist, men tað var stríggið. Ein jarnskiva lá omaná blokkinum. Vit fryktaðu fyri, at hon fór at loypa uppav. So hevði verið galið, men hetta spældi væl av. So varskógvaðu vit teir á brúnni, og tá var í ordan.

Hatta var tað sum hendi við róðrinum við Niels Finsen. Tá fóru vit aftur at sigla undan."

Axel helt, at tað er heilt vist, at teir eru komnir tvørtur um eina grynnu, tí teir vóru so nær landi. Tað vóru nógvir menn, sum hava brattan farið á hesum leiðum, men ein slíkan sjógv høvdu teir ikki sæð. Tað vóru eisini ordilig boðabrot.

## Hans Pauli uttanborða

Tað hendi eingin mannskaði, hóast nógv stóð á. Tað kundi eins væl enda galið hjá Hans Paula Hansen úr Funningsfirði, sum var ein kelda hjá Niels Juel.

Hann fór fyri borð í einum broti. Eina ferð kemur ein endi í